# Føroyska summarið líkist sær sjálvum

**KAPPRÓÐUR Veðrið skifti, sum tað bara ger í Føroyum, og vinnararnir vóru úr nógvum feløgum og økjum, tá ið ársins fyrsta FM kapping í róðri var á skránni**

Tróndur Arge

Tað er summar í Føroyum, tá ið kappróðurin setir dám á leygardagarnar hjá so mongum. Nógvir av rógvarunum hava fyrireikað seg síðani eina ferð í vetur.

Leygardagin var tað álvari í kappingini, og tá eru tað so mong onnur enn rógvararnir, sum eiga sína uppgávu. Eitt nú foreldur og onnur, sum frá morgunstundini av sóust fara eftir landsvegunum við páhangsvogni og kappróðrarbáti upp á sleip.

Mjørkin spældi eitt odruligt puss leygardagin. Tað er sjáldan, at mjørkin er so tjúkkur í Klaksvík, sum hann var tað frá á middegi og seint út á seinnapartin.

Tað var einki annað at gera enn at bíða við áliti á, at tá ið tað í Føroyum eina løtu er eitt slag av veðri, so gongur tað ikki so long tíð, inntil tað verður heilt øðrvísi.

Seint seinnapartin sá sólin í Klaksvík, og meðan ljós og sýni skiftu í pollamjørkanum, so gjørdu fyrireikararnir eitt megnar arbeiði. Tað bar so aftur við sær, at tað bar til at avgreiða róðrarnar.

Ofta hava bátarnir úr høvuðsstaðnum vunnið mest sum alt. Soleiðis var tað ikki hesa ferð. Fuglafjørður, Klaksvík, Runavík (2), Argir (2), Kvívík og Havnar Róðrarfelag (2) vunnu, og í flestu kappingum var kappingin so mikið tøtt, at tað eru góðir møguleikar fyri spennandi kapping og øðrum vinnarum, tá ið tað nú leygardagin verður kappróður á Sundalagsstevnu í Hvalvík.

*trondur@sosialurin.fo*

# Høvuðsstaðurin best í barnaróðrinum

**BARNARÓÐUR Genturnar á Argjum og dreingirnir í Havnar Róðrarfelag vunnu fyrstu FM róðrarnar á 250 metrum**

Tróndur Arge

Fyri fyrstu ferð nakrantíð telja barnaróðrarnir við í FM kappingini. Tí var talan um søguligar róðrar á 250 metra teininum. Fasti starturin varð nýttur, og í kappingini millum dreingjamanningarnar vóru tað tveir bátar hjá Havnar Róðrarfelag, Títlingur og Drekin, sum saman við Havfrúni úr Vestmanna endaðu á trimum teimum ovastu plássunum.

Títlingur var bara stavnin frammanfyri Havfrúnna, sum var rongina frammanfyri Drekan.

Í gentukappingini var Teistin hjá Argja Róðrarfelag fremstur. Teistin var meiri enn eina bátslongd frammanfyri Spógvan hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ, sum aftur var meiri enn eina bátslongd frammanfyri Ørnina og Fípuna Føgru, ið vóru í sera tættari kapping um triðja plássið.

**BARNARÓÐUR** GENTUR

| | | |
|---|---|---|
| **1** | **Teistin** | **02:47.18** |
| 2 | Spógvin | 02:51.01 |
| 3 | Ørnin | 02:55.07 |
| 4 | Fípan Fagra | 02:55.15 |
| 5 | Jallurin | 03:01.11 |
| 6 | Junkarin | 03:03.07 |
| 7 | Svanur | 03:07.04 |
| 8 | Firvaldur | 03:07.06 |
| 9 | Heykur | 03:08.02 |



*Eysturoyingar vunnu sannførandi í nýggja bátinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Tað glapp hjá nýggja Eysturoyingi

**10-MANNAFØR Avrikið var sannførandi hjá Eysturoyingi, sum í fjør var bæði nýggjur og vrakaður, og nú er favorittur frammanfyri tveir avbjóðarar**

Tróndur Arge

Bátinum bilar einki. Tað varð í hvussu so er staðfest leygarkvøldið í Klaksvík. Sámal Hansen hevur smíðað nýggja Eysturoying, og tí hevur tað sjálvsagt ongantíð verið ivi um, at báturin stendur øll mát, sum hinir bátarnir hjá Sámali so meistarliga gera.

Tá ið Eysturoyingur í fjør ikki vann, so varð avgjørt at flota gamla Eysturoyingin – tann frá 1998 – aftur, men leygardagin vóru menninir í Kappróðrarfelagnum NSÍ aftur í nýggja bátinum, og teir vunnu sannførandi. Hetta var fyrsta ferðin, at teir vunnu í nýggja bátinum.

Tað er harmuligt, at tað bara eru trý 10-mannafør, sum kappast, men norðoyastevnuróðurin vísti, at tað eru møguleikar fyri, at tað kann fara at verða spennandi, hóast Eysturoyingur í fyrsta róðrinum ongantíð var rættuliga hóttur av hinum báðum.

Eysturoyingur hevði besta startin, og tað vísti seg, at teir høvdu tamarhald á støðuni allan vegin. Vestmenningur royndi einar tvær ferðir at bjóða av, og frá at hava verið eina bátslongd aftanfyri eydnaðist tað vestmenningum at eta seg heilt fram á Eysturoyingin, men so svaraði guli báturin aftur. Tá ið teir fóru um málið, var munurin tó ikki meiri enn ein hálv bátslongd, og harvið er tað púra opið undan 2000 metra teininum, sum tað næsta leygardag fer at verða kappast á, tá ið Sundalagsstevna verður í Hvalvík.

Hoyvíkingur í Argja hami megnaði ongantíð at blanda seg í kappingina um fremsta plássið.

Seinastu nógvu árini hevur Eysturoyingur verið tann, ið hevur vunnið mest av øllum, men nú eru tað trý ár síðani, at guli báturin var meistari. Í fjør vann hann tveir teir fyrstu róðrarnar, og so vóru klaksvíkingar bestir. Í fyrraárið var Eysturoyingur ikki við á Norðoyastevnu og trimum øðrum róðrum, men í 2007 vann Eysturoyingur allar róðrarnar og harvið FM heitið.

*trondur@sosialurin.fo*

**10 MANNAFØR**

| | | |
|---|---|---|
| **1** | **Eysturoyingur** | **07:14.05** |
| 2 | Vestmenningur | 07:16.16 |
| 3 | Hoyvíkingur | 07:21.14 |